# SvF fer undir at senda ítrótt

**Føroyskur ítróttur verður eitt fast punkt á skránni hjá Sjónvarpi Føroya í framtíðini. Sendingin verður at síggja eina ferð um vikuna frá mars mánað og úteftir**

SJÓNVARP
*Ingi Rasmussen*



*Helst verður hondbólturin tann fyrsta ítróttargreinin, sum fær rúmd í nýggju sendingini í SvF um føroyskan ítrótt*

Frá mars mánað fer Sjónvarp Føroya undir at senda regluligar sendingar við føroyskum ítrótti.

Tað upplýsir Mikkjal Helmsdal, sjónvarpstjóri, fyri Sosialinum. Talan verður um eina fasta sending um vikuna, men akkurát hvussu sendingin verður uppbygd, kann sjónvarpsstjórin kortini onki siga um, tí enn er fasti ítróttartátturin bert á teknipappírinum.

– Vit ætla at leggja ítróttin afturat okkara sendiskrá og fáa hann í eina fasta legu, men akkurát hvussu konseptið verður, hvussu long ella hvønn dag sendingin verður, er ov tíðliga at siga enn. Tað arbeiða vit við í løtuni, sigur Mikkjal Helmsdal.

Hann vil heldur ikki siga, hvør fær ábyrgdina av sendingini, men tað tykist greitt, at fólk verður sett burturav til at taka sær av ítrótti í føroyska sjónvarpinum.

Mikkjal Helmsdal vil vera við, at tað ikki er øktu kappingini frá Televarpinum og Canal Digital fyri at takka, at sjónvarpið loksins fer undir at senda ítrótt regluliga.

– Ítróttur er vælumtókt tilfar, sum er nógv eftirspurt, og hetta er ein náttúrlig víðkan av okkara tilboðum til hyggjaran, sigur Mikkjal Helmsdal.

Við einari fastari ítróttarsending um vikuna afturat teimum føroysku sendingunum, fær hyggjarin sjón fyri søgn, at økta sjónvarpsgjaldið sæst aftur á skíggjanum við føroyskari framleiðslu.

– Vit fara at brúka ein stóran part av teimum øktu inntøkunum, sum vit hava fingið, til ítróttin. Vit hava ikki so nógv meira at arbeiða við kortini, tí ein stórur partur fer til lønarhækkingar og øktar útreiðslur, men hetta fáa vit so gjørt, sigur Mikkjal Helmsdal og sipar til hyggjaragjaldið, sum er er farið úr 1500 til 2000 krónur.

Sum Sosialurin skilir, so er ætlanin, at ítróttarsendingin fær um endan av hondbóltinum, og annars fer stórur dentur at verða lagdur á føroyskan fótbólt. Ein stór avbjóðing hjá sjónvarpinum verður at koma kring alt landið, tí ítróttarhendingar eru aloftast soleiðis skipaðar, at tær ganga fyri seg samstundis. Í fótbóltinum verður umhugsað at fáa eina hjálpandi hond frá feløgunum, tí tey taka ofta teir dystir upp, sum tey sjálv spæla.

Kappróður og aðrar ítróttargreinar verða eyðsæð eisini partur av sendingini, sum verður send eina ferð um vikuna, helst sunnu- ella mánakvøld.

# Bjørt útvarpsstjørna til Sjónvarp Føroya

Síðstu árini hevur Bjørt Samuelsen gjørt um seg í Útvarpi Føroya.

Hon hevur fingið góða undirtøku millum fólk, ið halda hana vera ein seriøsan og viðkomandi journalist.

Nú missir Útvarp Føroya hennara dygdir, tí í næstum verður hon í staðin at síggja á skíggjanum hjá Sjónvarpi Føroya. Hon verður journalistur á tíðindadeildini og skal sostatt í høvuðsheitum verða á redaktiónini, ið framleiðir Dag og viku.

Í útvarpinum hevur Bjørt somuleiðis víst, at hon eisini dugir at stýra einum kjaki, og tí kunnu vit helst eisini vænta, at hon verður vertur á onkrum av hinum sendingunum hjá SvF.

Bjørt Samuelsen er útbúgvin journalistur í Noregi.

**-ir**

# Endursendingar sýnast horvnar

**Allar føroyskt framleiddar sjónvarpssendingar verða sendar tríggjar ferðir, og tí er Sjónvarp Føroya givið við at vísa í skránni, nær talan er um endursendingar**

(E)
*Ingi Rasmussen*

Hyggur tú eftir skránni hjá Sjónvarpi Føroya, so skuldi tú trúð, at almenna føroyska sjónvarpsrásin púrasta var givin at endursenda tilfar. Men so er ikki. Tíverri vil onkur siga. Tíbetur vil onkur annar siga.

Áður hevur Sjónvarpið frámerkt allar endursendingar við (e), men tað verður ikki gjørt longur. Hetta er eitt tilvitað val, sigur Mikkjal Helmsdal, stjóri í Sjónvarpi Føroya.

– Tað er vorðin ein fastur politikkur hjá sjónvarpinum, at allar føroyskar sendingar verða sendar tríggjar ferðir, og tí hildu vit tað ikki verða neyðugt longur at vísa á, at talan er um endursendingar longur, sigur Mikkjal Helmsdal.

Í nógva kjakinum, sum hevur verið um Sjónvarp Føroya í síðstuni, hava atfinningar verið alment frammi um, at so nógv tilfar verður endursent í Sjónvarpi Føroya. Og sjónvarpsstjórin viðgongur, at tað er ein partur av forkláringini, at (e)-ið er farið í søguna.

– Vit standa inni fyri, at vit endursenda tilfar, tí vit halda tað verða neyðugt fyri at røkka so nógvum hyggjarum sum gjørligt. Men fólk hava hongt seg í, at frámerkið var ov nógv at síggja, t.d. sunnumorgnar, tá vit endursenda alt tað besta barnasjónvarpið frá vikuni, og tí hildu vit tað vera frægast at taka frámerkið burtur, sigur Mikkjal Helmsdal.

Spurdur, um ikki hyggjarin átti at fingið at vita, nær talan var um eina endursending, sigur sjónvarpsstjórin, at fólk eftirhondini kennast við tað fasta mynstrið, sum skráin hjá sjónvarpinum er bygd upp eftir.

Ongin kæra hevur verið um, at sjónvarpið at síggja til ikki longur endursendur tilfar.



# Løgmaður tryggjar seg áðrenn avgerðin fellur

**Talan er ikki um eina nýggja kanning, men løgmaður má tryggja sær, at alt verður tikið við, áðrenn hann fellur nakran dóm í málinum, sigur Anfinn Kallsberg, nú Fiskimálaráðið ger frágreiðing um Fiskimálaráðið. Frágreiðingin frá kanningarstjóranum er tyngjandi fyri landsstýrismannin Jørgin Niclasen**

KANNING
*Ingi Rasmussen*



*Um so er, at tað eru nøkur ting í frágreiðingini hjá Turið Debes Hentze, sum mangla, so má eg tryggja mær, at tey koma fram, og tí havi eg biðið landsstýrismannin við fiskivinnumálum geva mær eitt ummæli av kanningini, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður, sum hevur nógv at hugsa um í hesum døgum*

Landsstýrissessurin skinklar undir Jørgin Niclasen, og nú bíða øll eftir løgmanni.

Seinni í hesi vikuni fær Anfinn Kallsberg løgmaður eina frágreiðing frá Jørgin Niclasen, landsstýrismanni við fiskivinnumálum.

Við støði í hesari frágreiðing fer løgmaður at taka støðu til, um kanningin, sum Turið Debes Hentze advokatur hevur gjørt fyri landsstýrismálanevndina, skal fáa nakrar fylgjur fyri landsstýrismannin við fiskivinnumálum.

Í hesum sambandi hevur Jørgin Niclasen biðið umsitingina hjá sær í Fiskimálaráðnum gera eina frágreiðing í málinum, áðrenn hann svarar. Líkt kundi tí verið til, at løgmaður fer at byggja sína avgerð á ta frágreiðing, sum Fiskimálaráðið ger um seg sjálvt.

## Nýggj ting fram

Spurdur, um tað er rætt, at umsitingin sjálv ger kanningar í hesum máli, tá tað er hon, sum stendur fyri skotum, svarar løgmaður, at tað ikki er soleiðis, tað hongur saman.

– Eg vil fegin hava, at tann avgerðin, sum eg taki, er røtt og byggir á haldgott grundarlag. Um so er, at tað eru nøkur ting í frágreiðingini hjá Turið Debes Hentze, sum mangla, so má eg tryggja mær, at tey koma fram, og tí havi eg biðið landsstýrismannin við fiskivinnumálum geva mær eitt ummæli av kanningini, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgfrøðingar, sum Sosialurin hevur tosað við, siga, at tað »haldgóða grundarlagið«, sum løgmaður eftirlýsir, longu er til skjals í kanningini hjá Turið Debes Hentze, kanningarstjóra.

Løgmaður heldur ikki, at kanningin hjá Turið Debes Hentze og niðurstøðurnar eru so einfaldar, sum tær eru gjørdar til í fjølmiðlunum. Tær byggja á »veikar løgfrøðiligar fortreytir«, sigur hann.

– Spurningurin er, hvussu tyngjandi niðurstøðurnar eru. Tað kann ikki vera rætt, at bara fingurin verður settur á okkurt, so er bál og brandur. Spurningurin er, um nakað ólógligt er farið fram, antin tilvitað ella av ósketni, og tað má eg tryggja mær at kenpna svarið á, áðrenn eg taki nakra avgerð, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann dugir ikki at siga, nær málið er avgreitt, men vónar, at hann fær tikið eina avgerð í málinum, áðrenn vikan er úti. Fríggjadagin skal Jørgin Niclasen til fiskivinnusamráðingar í Íslandi, og sum skilst, er ongin ætlan um at útseta ta ferðina.

## Tyngjandi niðurstøða

Málið um embætisførsluna hjá Jørgin Niclasen snýr seg um, hvørt lógin um umlegging av lánum til fjarfiskiflotan varð fylgd, tá rækjutrolararnir Ocean Castle, Høgifossur og Arctic Viking fingu nøkur lán løgd um, og veðrættarstøðan hjá landskassanum varð broytt.

Um Ocean Castle sigur kanningastjórin, at umsitingin kundi verið meira heppin, men beinleiðis ólóglig er hon neyvan.

Í Høgafoss-málinum kemur kanningarstjórin til, at »landsstýrið ikki her í endanum hevur viðgjørt hetta mál, sum tað eigur, at málsviðgerðin ikki hevur verið fullfíggjað, og at úrslitið kundi verða vorðið eitt annað, enn um fastlagda mannagongdin í málsviðgerðini varð fylgd.« Og kanningarstjórin ger samstundis greitt, at landsstýrismaðurin hevur ábygdina. Landsstýrismaðurin hevur havt kunnleika til málið, og hann eigur tí eisini at verða vitandi um, at lógin krevur, at ein meting verður gjørd, sigur kanningarstjórin.

Søgan er tann sama við Arctic Viking. Kravið í lógini sigur, at ein meting skal gerast av fíggjarstøðuni, tá lán verða løgd um. Tað varð hon ikki, tá lánið til Arctic Viking varð lagt um. Tað var hon heldur ikki, hóast umsøkjarin undir málsviðgerðini boðar frá munandi lánitørvi, sigur frágreiðingin hjá Turið Debes Hentze.

Hvussu er og ikki. Kanningin liggur á borðinum, og politiski spurningurin er, um málið skal fáa avleiðingar ella ikki. Ta avgerðina eigur í fyrstu atløgu løgmaður. Og meðan vit bíða, bíðar løgmaður eftir einari nýggjari frágreiðing frá sínum landsstýrismanni og hansara umsiting.


Eisini skal hann tryggja, at veðrættarstøðan á umløgdu skuldini ikki versnar orsakað av umlegg-ingini. Tá bert ein meting fyriliggur, sum setir fíggingarvirðið til 21,5 mió kr. og samstundis er grundarlag undir at umleggja 17,4 mió kr. í veðrættarstøðu beint aftaná, og landsstýrið seinni játtar, at nevndu 17,4 mió kr. koma at standa aftanfyri 28,5 mió kr., uttan at nýggj meting fyriliggur, sum m.a. kann vísa á, at fíggingarvirðið nu er samsvarandi høgt, er landsstýrið farið útum sína heimild sambært lógini.

*Kut úr frágreiðingini hjá Turið Debes Hentze um viðgerðina av láninum til Høgafoss*

HYGG HER
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Brúktir bilar til sølu
Citroen Saxo 1,5D 3h
km 120.000 Jul'97
80.000,-
Citroen ZX 1,9TD 5h
km 183.000 Mai'97
85.000,-
Peugeot 405 2.0i stc
km 67.000 Jun'95
90.000,-
Citroen Xsara 2,0 HDi
km 95.000 Nov'99
130.000,-
Nissan Almera 1,4i
km 64.000 Okt'98
83.000,-
Daewoo Leganza 2.0i
km 17.000 Okt'98
119.000,-
Chrystler Voyager 2,4i
km 82.000 1995
115.000,-
Toyota Corolla 1,3i
km 24.000 Feb'02
103.000,-
VØRUVOGNAR
Citroen Jumper 2,5TD
km 120.000 1996
120.000,-
Nissan Serena 2,3D
km 88.000 Mai'97
92.000,-
Citroen Berlingo 1,9d
km 68.000 Okt'99
89.000,-
Nissan Serena 2,3D
km 102.000 Mai'97
92.000,-
Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar
Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin